120x200. Ljósa- og myrkagrá. Einki brúkt.
*314368 - 514368*

**KLÆDNASKÀP TIL SØLU**
Hvítt klædnaskáp við bókafingeraðum hurðum til sølu fyri 500 kr. Mát: 200x120x60 við hyllum og kurvum.
*314368 - 514368*

**REOLVEGGUR**
Myrkur, breidd 130 hædd 170 djúpt 45, 2 skáp undir, bókhillar og 1 skáp til sølu fyri 400,- kr.
*Tlf. 51 60 89*

**SPÍSIBORÐ**
Stórt spísiborð v/ 6 stólum, 2 skuffur og 1 eyka pláta til sølu fyri sámuligan prís. Lítið brúkt.
*Tlf. 328066 (aftaná kl 18)*

**INNBÙGV BÌLIGA TIL SØLU**
Sofaborð 250 kr, Skiftiborð 300 kr, 2 skápshurðar 132x49 200 kr, Leðurstólur svartur 1000 kr. Leðursofa Svørt 2,5 1400 kr, Køksborð stórt 600 kr, 6 Stólar 400 kr stk. Song Boxmadrass 90x200 (180x200) 1000 kr, Song Boxmadrass 80x200 900 kr.
*tlf 224910*

**SPÍSIBORÐ**
Bók spísiborð, ovalt við tveinum eyka plátum og seks stólum, til sølu fyri 2.500,-.
*372062*

## Lutaseðlar

**LUTASEÐLAR**
Skótaliðið Borgin. Vinnandi lutaseðlarnir við Jóansøkubálið 25/6 fullu soleiðis: 1. Gulur seðil 564 2. Bláur seðil 308 3. Bláur seðil 506 4. Bláur seðil 56 5. Bláur seðil 68 6. Bláur seðil 316 7. Gulur seðil 256. Vit takka hjartaliga fyri stuðulin. Vinnarar kunnu ringja á tlf. 422204.
*Skótaliðið Borgin, Hvalvík*

**KFUM Í HAVN**
Lutaseðilin til frama fyri KFUM í Havn. Hesin vinnari hevur enn ikki gjørt vart við seg: 3. vinningur nr. 2103. Vinningurin fæst við at ringja
*Tlf. 314139, 311824 ella 211824*

## Matur

**NEYTAFJÓÐRINGAR**
Kunnu bíleggjast.
*Tlf. 218101 Velbastað*

**HYGG HER!**
Góður turrur fiskur og saltaðir kjálkar bíliga til sølu.
*Tlf. 250856*

## Pløgg

**TIL SØLU**
Føroykst skjúrt, dyrriklæði og turriklæði til gentu 6-8 ár.
*328074*

**HOSUR TIL SØLU**
Til føroyska mannfólkabúnan, myrkamorreyðar og myrkabláar.
*Tlf. 503249*

**BARNASETT**
»Lotus« komplett sett til før. klæðir. Brosja, beltispenni, 8 mallur og stimi, alt fyri 490 kr.
*Tlf. 373169, 373313 ella 573999*

**STIMI TIL SØLU**
Stimi til vaksin 300 kr. Ring
*Tlf. 373169, 373313 ella 573999*

**TIL SØLU**
Nýtt broderað turriklæði og fyriklæði, grønt, til sølu fyri 4.000 kr.
*Tlf. 216291*

## Samband

**SAMBAND**
Er ikki onkistaðni í landinum ein søt einlig kvinna í passandi aldri, sum dámar at skriva og fáa brøv? Eg eri 45 ár, 172 cm, annars vanligur, við nógvum positivum áhugum. Skriva nakrar reglur um teg sjálva við mynd, 100% tagnaðarskylda. Skriva til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
*Bill.mrk. 2113-11*

## Súkklur

**TIL SØLU**
Ein sprinter Cross 26'' fjallasúkla, 21gear, fjarðar framman, km.vísara, hevur súkla 970 km. 2 ar, sær út sum nýggj. Nýprísur 4.450 kr., til sølu fyri 2000 kr.
*Tlf. 448173 ella 218173*

**DEILIR TIL YAMAHA FS-1**
Vit søknast eftur forgaflum og støddemparum til Yamaha FS-1 fyri. Ein sámuligan prís. Arðir lutir hava eisini áhuga, so sum stell og setur. Ring til
*Tlf. 271110 ella 263502. Martin og Sonny*

**APRILIA FX 50**
Til sølu. Ring og hoyr meira.
*Tlf. 422436 John*

**APRILIA SR 50 LC DITECH SCOOTARI TIL SØLU**
Sum nýggjur, bert koyrt 600 km., 2 ár, selist fyri 18.000 kr. Nýprísur 25.000 kr.
*Tlf. 316795 eftir kl. 17.00*

**MOTORSÚKLA TIL SØLU**
Yamaha FZ 6 Fazer, 600 ccm, 98 hk., árg.01-2004, koyrt 3200 km. Ring.
*Tlf. 250191-319172*

## Teldur

**FARTELDA TIL SØLU**
Dell Inspiron 8000, Intel Pentium 3, 800 MHZ, 256 MB DDR Ram, 40 GB harddisk, Gforce 2, grafikkort 8x DVD og brennara, 15'' skerm, Win XP, Office, til sølu fyri 4000 kr.
*Tlf. 253295*

**FLATUR TELDUSKERMUR**
Av slagnum FujitsuSiemens til sølu
*Tlf. 250955*

**BREIÐBANDS ROUTARI**
Bert nýttur í 11/2 ár kann nýtast til bæði Kall og Føroya Tele Breiðband. Ring og gev eitt boð
*Tlf 251235*

**GÓÐ HEIMATELDA**
1.4Ghz, 512 MB DDR-RAM, 88 GB, DVD brennari, 17"Skerm, netkort og GForce2 GTS grafikkort. Selist hægstbjóðandi
*Tlf 251235*

**TELDA TIL SØLU**
Uml. 1 ára gomul telda til sølu. AMD 3200+ cpu, 1024 MB DDR 3200 RAM, 80 GB harðdisk, Radeon 9800Pro við video-out, DVD spælari,"asus a7n8x deluxe móðurkort við 4 USB 2 stikkum,2x netkort og 6 kanal ljóð
*Windows XP pro installera og 17'' skermi til sølu fyri kr. 8500*

**ER TAÐ NAKAR IÐ EIGUR**
Tekken 1 og Tekken 2 til playstation at selja mær. Bara tú eigur eitt av teimum so skalt tú ringja á
*tlf 448784-262782*

**TIL SØLU**
Ein Samsung telduskermur 17'' til sølu. Eitt sett hátalarar Active 85 N, Printari Olivetti JP 792, knappaborð, telduborð við tveimum hillum, mús og mátta fylgir við. Kann síggjast. Til sølu fyri 2800 kr. Ring
*Tlf. 513983 best eftir kl. 17*

**FIFA 2005**
Til teldu til sølu fyri 200 kr.
*Tlf. 250178*

## Tónleikur

**HÁTALARI**
V 30 skal vekk
*421419*

**TIL SØLU**
Er ein Kenwood Minidisk Recorder fyri 2500 kr. Er lítið og einki brúktur.
*Tlf. 221826*

**TIL SØLU**
Denver 40 radio við fløguspælara og 2 hátalarar til 3 fløgur og 2 kasettubond til sølu fyri 450,- kr.
*Tlf. 51 60 89*

**HÁTALARAR**
2 stórir hátalarar til sanganlegg til sølu fyri 5000 kr.
*Tlf. 421419*

**MARSHALL KABINETT**
Við 2x12" Celestion V-30 hátalarum til søu fyri 2000 kr.
*Tlf. 421419*

**IBANEZ EL/KASSAGUITAR**
við kufferti, lítið brúktur til sølu fyri 2800.- kr.
*Tlf 42149*

**KLARINET**
Yamaha YCL 32, úr svartviði í sera góðum standi, nógv bløð fylgja við, til sølu fyri kr. 2.800,-
*Tlf. 747870*

**J BANES K5 EL BASSUR**
11/2 ár til sølu fyri 110.000 kr. Ring og hoyr meira.
*Tlf 223874*

## Út- & Sjónvarp

**ANALOG DEKODARI**
Av markinum Pace til sølu.
*Tlf. 503249*

**TIL SØLU**
28'' Telefunken sjónvarp við borði og ein Pioneer DVD avspælari. Ring og gev eitt boð.
*Tlf 251235*

**NÝTT SJÓNVARP TIL SØLU**
Toshiba Widescreen/flatskerms projektións Sjónvarp 43" VJ33 seria, 110 MHS, 110 cm, trý skarsstikk: S - video stikk, Home theater hátalarastikk, ikki neyðugt við sjónvarpsborði gev eitt boð
*Tlf. 321370 ella 258224*

**SUPER TILBOÐ**
Dantax DVD spælari, VCD/CD - R/RW, NP3 JPEG spælari - lítið brúktur, í góðum standi kr. 550. Televarp móttakari kr. 550. Dantax - Widescreen sjónvarp -28" lítið brúkt í góðum standi kr. 3200. sjónvarpsborð glas lítið brúkt kr. 300. Verður selt samla fyri kr. 4000
*Tlf. 321370 ellat 258224*

**TIL SØLU**
Ein parabolskermur 1 metur og ein triax digital móttakari
*Tlf. 592725*

**TIL SØLU**
1 ára gamal DVD Upptakari Panasonic DMR E55 við 3 DVD-Ram diskum til sølu fyri 3000 kr. Kann upptaka og spæla samstundis (chasing the playback function). Upptakarin er í góðum standi og sær út sum nýggjur.
*Tlf. 503510*

**SPILDURNÝTT LG DVD/CD SURROUND ANLEGG**
Bíliga til sølu. Nýprísur: 3.500.- Nú: 3000.-
*Tlf. 317365*

## Ymiskt

**JØRÐ Í HOVI TIL SØLU**
3.000 fermetrar jørð í Grønadali til sølu um nóg høgt boð fæst.
*229235*

**ELDRI HYDRAULISKT**
P.R.M. gear, 3:1, bíliga til sølu.
*Tlf. 218896*

**GRINDAKNÍVUR TIL SØLU**
Hevur hondsmíðja laminera blað. 4000 kr.
*Tlf. 226315-317414*

**KANNING AV FØROYSKUM HANDVERKI**
Øll sum enn ikki hava sent aftur spurnarblaðið til "Kanningina" verða vinaliga biðin um at svara skjótast.
*Heilsan Randi og Jónhild / Føroya Heimavirkisfelag*

**HJÁLP**
Er tað nakar sum kann hava eitt barn við í flúgvarinum hjá Atlantic Airways 1. august til Billund. Tú kanst ringja á
*Tlf. + 45 75 68 93 88 ella 448679*

**PLASTRØR TIL SØLU**
Uml. 10 m. av plastrørum v. samlimuffum. Diam. ø. 42 cm.
*Tlf. 503249*

**VELUX TAKVINDEYGA**
Við termorútum, std. 70x55 til sølu.
*Tlf. 503249*

**TIELBÜRGER SLÁIMASKINA**
Til sølu sum eykalutir.
*Tlf. 503249*

**PLENUKLIPPARI**
Ein el-plenuklippari 1000 W við grasuppsamlara til sølu.
*Tlf. 503249*

**PRIVAT UNDIRVÍSING Í ENSKUM**
American/english teacher offering individual privat lessons. Any age, every ability ok. Or small groups, immersion style. Price negotiable. Eg skilji føroyskt. E-mail: miakelis@hotmail.com or call
*Tlf. 312240*

**JØRÐ TIL SØLU Í FUGLOY**
2 gyllin og 7 skinn í Sunnara parti á Kirkju og 1 gyllin í Skarðsvík. Innangarðs liggur á Kirkju.
*Tlf. 751152*

**DYKKARAÚTGERÐ**
Sum er lítið brúkt bíliga til sølu.
*228997*

**GALLERÍ VÁGSBOTN**
Hevur stóra søluframsýning á Torginum í SMS mánadagin 4. juli til og við 9. juli av gomlum lutum, antikvitetum og málningum, m.a.: møblar, spegl, teppir, silvur, glas, postalín, smykkur o.m.a. Stell: Rosenborg, Frisenborg, Løvfald, maage og fleiri. Um nóg høgt boð fæst, seljast málingar av Frida Zachariassen, hans J. Glerfoss, S. J. Mykines, Sigmund Petersen, Z. Heinesen, J. Waagstein og fl. Um nakar hevur gamlar lutir, møblar ella málningar at selja, ring
*Gallerí Vágsbotn, tlf. 314293 ella 214293*

**FRÍMERKIR TIL SØLU**
Fø. frímerkjamappur til sølu. 1977-1985. 1200 kr.
*503619*

**MÁLNINGUR TIL SØLU**
Oljumálningur av Amariel Norðoy til sølu um nóg høgt boð fæst. Støddin er 48x58 cm
*Tlf. 509547*

**STEINPRENT TIL SØLU**
Innrammað steinprent gjørt av Torbjørn Olsen til sølu fyri 1.500 kr. Steinprentið er 50x68 cm. Innrammað 73x87
*Tlf. 509547*

**TIL SALG**
Morsø brændeovn ældre model - sort ca 120 cm høj. 1000 kr.
*Tlf. 216623*

**TIL SALG!**
Spindeltrappe til salg. Ø:130 cm. Ring og hør nærmere.
*Tlf. 310623 - 319826*

**TIL SØLU**
Ein konsúkla, einki brúkt, bíliga til sølu.
*Tlf. 441216*

**PIZZA OG GRILL**
Øll útgerð til grillbar og ein stein pizzaovnur 50.000 kr.
*Tlf. 448120 og 210303*

**EIGUR TÚ EINA FANTASTIKSA MYND**
"digitala" IÐ tú kundi hugsa tar í rammu, í einum ótrúligum foto-kvalitetið. So er møguleikin her. Send myndina til mín via email: rtausen@gmail.com Nógvar støddir av fotopappíri mat og høglands at velja í, tú velur sjálv/sjálvur. Og eg printi tær alt út í hægstu góðsku. Ring til mín og fá nærri at vita.
*Tlf. 272908 Best eftir kl 18.00*

**5 STK INNIHURÐAR**
Slattar til sølu fyri 200 kr stk við karmi.
*Tlf. 316839*

**NIKON F50**
28-70mm 1:3,5-4,5D. 70-210mm 1:4-5,6. Cullmann CX 40 blitz . Til sølu fyri kr. 4.500,-
*Tel. 214161*

**KETJARAR TIL SØLU**
Tenniisketjari 300 kr og Badmintonnketjari 200 kr.
*Tlf 224910*

# Nýggjur sangari til Showmenn



*Fríggjakvøldið sleppa áhoyrararnir hjá Showmonnum at fáa ein aktivan leiklut, tá tað eisini stendur teimum í boði at verða forsangarar hjá bólkinum*

**Ein nýggjur variantur av karaoke-kapping verður á Rex fríggjakvøldið, tá nýggjur sangari skal finnast til Showmenn**

BÝARLÍV
*Jákup Mørk*

Tað er nú ikki soleiðis, at Jens Marni, Kim ella James ætla sær at melda seg úr Showmonnunum, men heldur er talan um eitt øðrvísi karaoke-tiltak, sum Rex hevur sett á skránna nú fríggjakvøldið.

Kvøldið er nevnliga skipað soleiðis, at Showmenn eru navnið, sum spæla til dansin, men hetta kvøldið fáa áhoyrararnir so eisini høvi at átaka sær ein meira aktivan leiklut. Við barrina er ein listi við sangum, sum orkestrið hevur á skránni, og so kunnu áhoyrarnir tekna seg til at syngja onkran av hesum.

So hvør veit. Kanska onkur nýggjur songfuglur eisini traðkar fram fyri almenninginum hetta kvøldið. Og um ikki, so verður tað í øllum førum so, at smílini fyri eina løtu gerast enn størri, enn tey plaga at vera!

# DJ Slow snúrar plátum á G

G!-FESTIVAL
*tíðindaskriv*

DJ Slow hevur gjørt nógv vart við seg á altjóða tónleikapallinum, og hevur miksað eitt ótal av løgum fyri alskyns tónleikabólkar og plátufeløg. Hann hevur arbeitt sum tónleikari, prodjúsari og "beat warrior for hire!" Hann hevur skrivað og framleitt tónleik til reklamur hjá heimsumfatandi fyritøkum sum Nokia, Siemens og Hewlett Packard, remixað løg fyri Tom Jones og The Cardigans, skrivað sjónvarpstónleik til sendirøðirnar "Survivor" og "Popstars" og arbeitt sum komponistur og framleiðari á soundtrackinum til finska stórfilmin "Addiction". Slow hevur eisini verið partur av navnframa Pepe Deluxe samstarvinum. Hesir gjørdu tónleik til Levi´s reklamur, vunnu ein "Golden Lion Award" á Cannes festivalinum og framleiddu hittsingluna "Before you leave". Umframt hetta innspældu og framleiddu Pepe Deluxe plátuna "Super Sound", ið verður mett sum ein av týdningarmiklastu finsku dance plátunum frá 90´unum.

Og fimur er finnin í øllum førum. Sum plátusnúður, ella DJ um tú vilt, hevur hann ikki færri enn fýra ferðir verið kosin besti DJ í Finnlandi. Hetta var í kappingini "Finnish DJ Championships". Í roynd var DJ Slow so skrappur, at kappingin stutt sagt mátti niðurleggjast. Slow vann hvørja ferð.

Tað er vert at leggja sær í geyma, og sigur nakað um musikalska formatið, at DJ Slow umframt alt annað, vit hava nevnt innan dance, hip hop og klubb verðina, eisini saman við saxofonleikaranum Tapani Rinne fekk sáttmála við legenderiska og hátt virda jazz plátufelagið Blue Note. Undir heitinum Slowhill leitaðu teir báðir sær aftur í finskar jazz klassikarar á plátu og samplaðu alt, ið teimum dámdi. Síðan settu teir hesar samplingar inn í ein spildurnýggjan ham við nútímans rútmum og ljóðum. Plátan gjørdist enn ein varði í Blue Note kataloginum.